## DAGSINS MEINING

# Eitt verkfalsstýri

Ommur og abbar hava rættiliga staðið sína roynd seinastu 14 dagarnar. Vinfólk og arbeiðsfelagar hava tikið eina hond í, so alt hevur kunnað lagað seg sum frægast. Tá á stendur, finna vit sum oftast eina ella aðra loysn. Uttan partarnir í sáttmálatrætuni, sum í 14 dagar hava latið allar dagstovnar spart streym og hita. Og sum hava latið nøkur tænastufólk á bústovnum arbeitt dag og nátt.

Nú høvdu tey flestu roknað við at partarnir vóru so mikið at sær komnir, at teir funnu eina loysn. Men gakk. Tvídráttur hevur verið síðani í vár, tá landsins stýrið, sum hevði lagt ansingarøkið út til kommunurnar at umsita, ikki hevði gjørt greitt, hvønn Pedagogfelagið skuldi samráðast við. Tá hesin spurningur var greiddur, tók nýggjur tvídráttur seg upp um útrokningargrundarlagið.

Sjálvandi skal hetta koma upp á pláss, og sjálvandi ber eisini til at vera ósamdur um smálutir. Um tað stóð í botni um krónur og oyru, so var tað at skilja. Men tað ger tað ikki. Sambært tí, sum er frætt frá samráðingunum, eru partarnir samdir um lønarhækkingina. Hitt útrokningarlagið – máttu nøkur fakfólk – búskaparfrøðingar, grannskoðarar ella løgfrøðingar – kunna funnið út av. Og so kundi lønin verið regulerað aftaná.

At steðgur skuldi koma í aftur í vikuskiftinum, tykist ábyrgdarleyst. Hóast landsstýrismaðurin segði, at ein føðingardagur var atvoldin til, at samráðingarnar ikki hildu fram, fáa vit okkum ikki at trúgva tí. Har má okkurt annað liggja í buktini sum hevur við samráðingarsnildi ella – førleika at gera.

Ongantíð í nýggjari søgu okkara, hava vit havt so nógv verkføll sum seinastu trý árini. Í dag so galið, at vit kunnu ikki siga, at vit hava ein stabilan arbeiðsmarknað. Víst skuldu fakfeløgini vinna nakað innaftur, sum føroyski løntakarin hevði mist í kreppuni, men nógv av verkføllunum hava snúð um smálutir.

Fyri hálvum triðja ári síðani var nærum allur almenni arbeiðsmarknaðurin í verkfalli í fleiri vikur. Seinri fóru lærarar í verkfall fyri fyrstu ferð í søguni. Men tað mest skilaleysa var hóast alt lønartrætan um yvirmenninar á vaktarskipinum Brimli, sum bar í sær, at eitt skip fyri 90 milliónir lá svínabundið við norska bryggju í 5 mánaðar. Og Guð hjálpi okkum, um tað sama ikki endurtók seg, tá strandfaraskipaið Teistin skuldi fara í sigling. Heldur ikki tá megnaði Fíggjarmálastýrið at finna eina loysn. Um dagarnar søgdu 18 sjúkrasystrar upp á Landssjúkrahúsinum, tí nú orka tær ikki meira. Og í dag fer pedagogverkfallið inn í sína triðju viku. Tað skerst ikki burtur, at landsins stýri hevur taklað almenna arbeiðsmarknaðin – lønir og sáttmálaviðurskifti – stak illa. So illa, at summi nú kalla landsins stýrið fyri »streikustýrið«!

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Ferðasambandið til Klaksvíkar

**Eivind Jacobsen**
*Strendur*



Havi fyrr víst á, at tingmenn í Norðoyggjum ikki gera nakað fyri at betra um ferðasambandið. Hetta er sjálvandi ein trupulleiki. Heldur ikki vildu teir taka undir við uppskoti frá m.a. Sambandsflokkinum fyri at bøta um trupulleikan. Hetta uppskot bleiv felt av samgonguni, sum telur 3 av 4 norðoyatingmonnum og 3 av 8 landsstýrismonnum úr norðoyggjum. So viljin røkkur ikki longur enn til orð.

Tó hoyrist at samgongan ætlar at skjóta upp, á eykafíggjarlóg fyri í ár, at seta av pengar til undirsjóvartunnil. Tað er at gleðast yvir, at samgongan skilir týdningin at av seta pengar av í góðari tíð. Serliga tá vit hava í huga, at samgongutingmenn fyri 3 vikum síðan skýrdu sambandsflokkin og javnaðarflokkin fyri at vera óseriøsar, tí teir skutu upp, at seta pengar av til Klaksvíksleiðina og undirsjóvartunnil. Tað eru gott at síggja, at uppskot og skriving í bløðunum fær samgonguna at broyta ætlan.

### Broyti ferðaætlanina

Trupulleikin í dag er, at Dúgvan ikki tekur allar bilarnar, sum skulu við. Tí standa bilar, farmur og fólk alt ov ofta og bíða í tímavís, áðrenn tey sleppa um fjørðin. Ásannandi at tað ganga fleiri ár til undirsjóvartunnil kemur, havi eg gjørt eitt uppskot til broyting av ferðasambandinum. Um Dúgvan siglur pendulfart allan dagin, ber til at fáa ein eykatúr mitt á degi. Hetta hevði bøtt munandi um hjá norðingum. Øll vita, at trupulleikin er um dagin. Tí loysur tað ongan trupulleika at sigla meira seint á kvøldi. Tí kundi hetta uppskot bøtt munandi um ferðasambandið.

Hetta ger eisini, at ferðafólk av ”fastlandinum” tora at taka bilin við, uttan at óttast at bilurin stendur eftir í Klaksvík. Eisini høvdu handilsmenn spart tíð at avheinta umboðsmenn, sum koma at vitja. At seinasta fráferð er heldur seinni, hevði verið stór hjálp til ítróttarfeløgini, sum brúka nógvar pengar til at leiga bát um fjørðin. Allar spardar útreiðslur koma norðingum til góðar.

Eitt hugskot kundi verið, at trailarar og størri bilar áttu framíhjárætt onkran túr, meðan privatbilar áttu framíhjárætt aðrar túrar. Hetta hevur verið roynt um Vestmannasund. Øll avmarking er óheppin, men um tað gagnar heildini eigur møguleikin at kannast. Ein bíleggingarskipan hevði eisini komið væl við.

Tað kann gerast ein trupulleiki at sigla allan dagin. T.d. er vanligt, at skip noyðast at rætta brek í motorinum o.l. av og á. Tí kann gerast neyðugt við styttri steðgi av og á. Men als ikki regluliga. Um onkur túrur onkran dag má avlýsast er betur enn als ongan túr at hava.

Nýggj ferðaætlan kemur í gildi 1. januar. Tíð er neyðugt at arbeiða skjótt, um Strandferðslan skal ávirkast.

**Uppskot til broyting**

| Úr Klaksvík | Úr Leirvík |
|---|---|
| 6 0 | 6 45 |
| 7 30 | 8 15 |
| 9 0 | 9 45 |
| 10 30 | 11 15 |
| 12 00 | 12 45 |
| 13 30 | 14 15 |
| 15 00 | 15 45 |
| 16 30 | 17 15 |
| 18 00 | 18 45 |
| 19 30 | 20 15 |
| 21 00 | 21 45 |

**Verðandi ferðaætlan**

| Úr Klaksvík | Úr Leirvík |
|---|---|
| 5 50 | 6 45 |
| 7 30 | 8 10 |
| 8 55 | 9 35 |
| 10 30 | 11 10 |
| 13 0 | 13 40 |
| 14 20 | 15 5 |
| 15 50 | 16 35 |
| 17 20 | 18 5 |
| 19 0 | 19 40 |
| 20 15 | 20 50 |

N.B. Hvør túrur er í broyttu ferðaætlanini 45 minuttir og arbeiðsdagurin 45 minuttir longri.

# Bók um hagar og seyðamark

BÓKMENTIR
*Tíðindaskriv*

Hósdagin 6. desember 2001 kemur út ein bók um hagar og seyðamark í Føroyum, sum Føroya Jarðarráð gevur út.

Í bókini er yvirlit yvir allar hagarnar í Føroyum við lýsing av markatali og áseyðatali í haganum, hvørji góðkend seyðamark eru í tí einstaka haganum og hvør er festari, eigari ella seyðamaður.

Eisini er yvirlit yvir allar festararnar.

Hagakortini hevur Matrikulstovan gjørt.

Í bókini er eisini hagalógin, girðingarlógin og grannastevnulógin, sum gamli landsdjóralæknin Dánjal Bærentsen hevur føroyska. Herumframt er greinar skrivaðar um útskifting, seyðamarking, landbúnaðarstevnur og løgtingslóg um landsjørð v.m.

Myndirnar av seyðamarkinum eru úr Móðurmálsorðabókini, sum Fróðskaparsetrið og Fróðskaparfelagið gav út 1998.

Bókin er í A4 stødd við 90 blaðsíðum og er serliga ætlað teimum, sum fáast við seyðabrúk og annan landbúnað. Herumframt er hon sera hent hjá teim myndugleikum, sum nevndir eru í landbúnaðarlóggávuni, eitt nú hegnsýnisnevndunum v.m.

Tað er Kári Thorsteinsson, sum hevur savnað og skrivað nógv av tilfarinum og sum saman við Jóannes Dalsgarð og Eyðvør á Váli á Jarðarráðnum hava lagt útgávuna til rættis.

Bókin er prentað á Estra og Helgi Justinussen hevur bundið inn.

Bókamiðsølan stendur fyri útgávuni og verður bókin í bókabúðunum hósdagin 6. desember 2001 og kostar kr. 150,00 eintakið.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:**
Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:**
Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Tíðindaleiðari:**
Jústinus Eidesgaard justinus@sosialurin.fo
**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad finnbjorg@sosialurin.fo
Anja Weihe anja@sosialurin.fo
**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Turið Kjølbro turid@sosialurin.fo
Stefan í Skorini stefan@sosialurin.fo
Heri á Rógvi heri@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
**Myndamenn:**
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1
700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo
**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 311820, Fax 314720
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Stødd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# 20 ár við HIV og eyðkvæmi

**Fyribyrgingarráðið**
Í ár eru 20 ár liðin síðan sjúkan AIDS (eyðkvæmi) tók seg upp í Los Angeles í USA. Hesir fyrstu tilburðirnir vóru samkyndir menn, og vísti sjúkan seg sum ein smittandi viknan av immunverjuni, víðari gransking á økinum vísti skjótt, at talan var um eitt virus, hetta virus fekk navnið HIV.

Tað er neyvan nøkur nýkomin sjúka í 20. øld, sum hevur vakt størri ans og størri ótta enn eyðkvæmi. Og her er veruliga nakað at vera bangin fyri:

a) Hon kemur sníkjandi. T.v.s. ein merkir ikki tey fyrstu árini, at ein er vorðin smittaður.

b) Hon er deyðilig eftir 12 –15 árum.

**Hvussu vanlig er sjúkan?**
Síðan farsóttin tók seg upp, eru uml. 22 mill. deyð av eyðkvæmi.

Í heiminum í dag eru eini 40 mill., sum hava AIDS ella eru HIV smittaði.

Í sokallaða 3. heiminum er eyðkvæmi og HIV smitta í øgiligum vøkstri, ringast er í Miðafrika t.d. í Zimbabwe, har roknað verður við, at heili 25% av fólkinum er smittað. Eisini eru fleiri lond í landsynningsasia hart rakt.

Í framkomnu londunum er støðan betri og meira stabil. Í Danmark var sóttin í hæddini í 1992-93.

Í 2000 blivu í Danmark fráboðaðir 48 tilburðir av eyðkvæmi og 248 tilburðir av HIV-smittu, hetta samanborið við 239 eyðkvæmistilburðir í 1993 og 380 tilburðir av HIV-smittu í 1992.

Her í Føroyum hava verið íalt 17 tilburðir av HIV smittu, 14 menn og 3 kvinnur. Av AIDS í útbroti (eykvæmi) eru 7 tilburðir fráboðaðir, og 4 eru deyð av sjúkuni.

Seinastu árini hava vit verið sera heppin í Føroyum við tað, at bert ein tilburður av HIV-smittu er fráboðaður síðan 1996 og eingin tilburður av eyðkvæmi síðan 1995.

**Hvussu smittar sjúkan?**
Nógv tann vanligasti hátturin er gjøgnum kynsligt samband; serliga stórur er vandin, um ein er samkyndur maður, sum hevur kynsligt samband við fleiri aðrar menn. Men vanligt kynsligt samband millum mann og kvinnu er seinastu árini blivin meira vanligur smittuháttur.

Rúsevnismisnýtarir, sum sproyta seg við dálkaðum nálum, eru ein serligur vandabólkur.

HIV-positivar kvinnur, sum eru við barn, kunnu smittað tað ófødda barnið.

Áðrenn tað gjørdist lógarkrav at kannað alt blóð, sum varð nýtt til transfusiónsviðgerðir, gjørdist nøkur sjúk av smittaðum blóði. Eisini hava verið nakrir tilburðir, har bløðarar eru blivnir smittaðir av heilivági, sum verður framleiddur av blóðúrdráttum.

Heilsustarvsfólk, sum eru um HIV-smittaði og eyðkvæmissjúklingar, kunnu vera so óheppin, at tey stinga seg av einari brúktari nál og blíva smittaði, men hetta er sera sjáldsamt (100 tilburðir í øllum heiminum).

**Hvussu vísir sjúkan seg?**
1 til 4 vikur eftir smittuna blíva uml. helvtin sjúk við influensu-líknandi sjúkueyðkennum og hovnum eitlum ella hálsabruna. Hesi sjúkueyðkenni hvørva aftur eftir fáum døgum, møguliga verður nakað av eitlavøkstri verandi fylgjandi árini.

Tá eini 8 – 10 ár eru liðin, kann tann smittaði fáa AIDS, eisini kallað eyðkvæmi, sum kemur av, at immunverjan viknar. Tey fyrstu sjúkueyðkennini av eyðkvæmi eru oftast eitt serligt slag av lungnabruna, sum kemur av einari mikroorganismu, kallað pneumocystis carinii, eisini sæst ofta soppabruni í munninum og í vælindinum og, at vektin minkar í stórum.

**Hvussu kann sjúkan viðgerast?**
Tær ígerðarsjúkur (infektiónir), sum koma av at immunverjan er viknað, verða viðgjørdar við antibiotika, anti-virus heilivági og anti-soppa heilivági. Sjálvt HIV-virussið kann ikki viðgerðast so, at tað hvørvur, men HIV kann tarnast við at geva fleiri sløg av anti-virus heilivági. Tað ber til at fylgja við sjúkugongdini við at máta hvussu nógv er av HIV-genstreingi í blóðinum og, hvussu lágt talið er av einum serligum slagi av hvítum blóðkroppum, kallaðir CD4+. Viðgerðin kann so rættast eftir úrslitinum av hesum blóðroyndum.

Hendan viðgerðin hevur gjørt, at eyðkvæmissjúklingar liva munandi longri og betri nú enn fyri fáum árum síðani, men eyðkvæmi er framvegis ein deyðiligt sjúka.

**Hvussu kann sjúkan fyribyrgjast?**
Tað verður granskað um alla verðina fyri at finna eitt koppingarevni (vaksinu) til at fyribyrgja HIV-smittu. Men hetta hevur ikki eydnast enn, hóast tað verða javnan gjørd framstig í hesari gransking.

Einasti háttur, vit kunnu fyribyrgja AIDS og HIV-smittu, er við at fyribyrgja, at virussið sleppur at breiða seg frá smittaðum til frískar persónar. Her skal beinanvegin sláast fast, at vanlig sosial samvera við ein HIV-smittaðan ella ein AIDS sjúkling, gevur ongan vanda fyri smittu. Ein vanligur kossur, tað at drekka av samað glasi, er t.d. vandaleyst.

Tað, sum smittar, er kynslig samvera við ein smittaðan. Um ein ikki hevur kynsligt samband við ein smittaðan persón, er eingin vandi fyri smittu. T.v.s. at pør, sum ikki hava kynsligt samband uttanfyri paralagið, eru tryggjaði móti smittu.

Um annar ella bæði kortini fríggja við øðrum, eru ráðini at brúka hít. Hítin skal brúkast óansæð hvat slag av sex, ein dyrkar við tí fremmanda. Hítin skal brúkast rætt t.v.s. hvørjaferð og undir allari samleguni. Um hon verður brúkt rætt, verjir hon ikki bert móti HIV-smittu, men eisini mót øðrum kynsbornum sjúkum, eitt nú klamydia og gonoré.

Sum nevnt eru serlig atlit at taka, um ein er rúsevnismisnýtari. Rúsevnismisnýtarir, sum sproyta seg, mugu ansa eftir ikki at nýta brúktar nálir, tí HIV virus kann sita á tí dálkaðu nálini, og tá er vandi fyri at blíva smittaður.

**Hvat er ein HIV-roynd?**
Ein HIV-roynd er ein blóðroynd, sum vísir um ein hevur andevni móti HIV-virus í kroppinum.

HIV-royndin gerst positiv í fyrsta lagi 4 – 12 vikur eftir, at ein er smittaður. Royndin kann takast anonymt, t.v.s. at einum nýtist ikki at upplýsa navn ella føðingardag.

Fyrimunurin við einari HIV-roynd er tann, at ein fær vissu fyri, um ein er smittaður ella ei.

Ein hevur tá møguleikan at koma tíðliga í viðgerð.

Vansin við einari HIV-roynd er tann, at ein, um hon er positiv, noyðist at liva við vitanini um at vera smittaður við einari lívslangari álvarsligari ígerðarsjúku.

**Hvar kann ein fáa meira at vita um AIDS og HIV-smittu?**
Kommunulæknarnir svara øllum spurningum um AIDS og HIV-smittu eins og um heilsu og fyribyrging annars. Fyribyrgingarráðið (postsmoga 135. 110 Tórshavn) er eisini til hjálpar.

Á alnótini finnst ein ørgrynna av góðum heimasíðum um eyðkvæmi og HIV.

Sum dømir kunnu nevnast:
http://www.netdoktor.dk
og
http://www.aids-linien.dk

Hesar heimasíður hava allar leinkjur til aðrar heimasíður, so ein kann leita víðari runt í verðini.

**Hví er tað so umráðandi við upplýsing um fyribyrging av júst hesari sjúkuni?**
Hóast vit, sum nevnt, ongan eyðkvæmistilburð hava havt seinastu árini, so er HIV-smitta og eyðkvæmi potentielt ein stór hóttan. Um fólk gerast minni varin viðvíkjandi teirra kynslívi, er vandi fyri, at talið av tilburðum fer at økjast skjótt og nógv.

# Yvirlýsing frá Sinnisbata í samband við verkfallið hjá Pedagogfelagnum

**Sinnisbati**
*Svenning av Lofti, form.*



Sinnisbati harmast um at psykisk sjúk og onnur, ið hava serstakan tørv, er vorðin ein kastibløka í verkfallinum hjá Pedagogfelagnum.

Tað er átaluvert, at hesi fólk, ið vit umboða og sum á ein serstakan hátt hava fyri neyðini at kenna ein tryggleika gerandisdegnum, er vorðin gíslar í eini ósemju, sum tey ikki eru ein partur av.

Heitt verður staðiliga á partarnar í ósemjuni um at fáa enda á verkfallinum beinanvegin, og at bera so í bandi at bústovnar, sambýli og onnur støð, sum eru heim hjá psykisk sjúkum og øðrum, ið hava serstakan tørv, ikki verða rakt av møguligum verkføllum í framtíðini.

# Familjupolitikkurin

**Hans Birgir Hansen**

Løgmansskrivstovan hevur sent arbeiðsgevarar/fakfeløg upplegg til skipaðan familjupolitikk, sum er til hoyringa rog ein ger viðmerkingar!

Tað er avgerandi neyðugt at fáa endurskoða/dagført løgtingslógir frá sjeytiárunum um 40 tíma arbeiðsviku! Tað er við at stytta arbeiðsviku niður í 35 tímar, at vit fáa skipað familjupolitikkin tíma og mánaðarlønt kring alt landið!

Tað vil siga at vit skulu hava skipað hálvdags arbeiði heima/úti galdandi mánaðar/tímalønt maður/kona/drongur/genta við børnum!

Tað eru nógvir pengar at tjena og spara við skipaðum familjupolitikki úti á arbeiðsmarknaðinum, kring alt landið, sum skjótast! Tað er áður í lesarabrøvum skrivað um 36 tíma arbeiðsviku og í seinastuni skipa arbeiðs-/familju-/frítíðar/privatlívið! Tað kunna øll sleppa undan dagligum stressi/fylgisjúkum, ið rakar alla familjuna, kring alt landið, hugsi um tað!

Tað eru nógvir pengar at tjena og spara við at hava børnini heima og tað slepst undan sjúkradøgunum, ið kosta nógv! Tað sama við at broyta lívs-, kost-, nýtsluvanar og læra seg at liva og virka rætt, bæði heima og úti í arbeiðslívi v.m.! Tað er tá øll kunnu koma at njóta arbeiðs-, familju-, frítíðar-, privatlív, tað krevur neyðugar fyrireikingar! Hvat siga tit lesarar til at fáa skipaðan familjupolitikk!